www.sunda.fo

SUNDA KOMMUNA

# Kunngerð

## um broyting í byggisamtyktini fyri Gjógv

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 13. mai 1997, verður við hesum boða frá, at Sunda kommuna á býáðsfundi tann 15.11.2010 hevur samtykt, at gera niðanfyristandandi broytingar í byggisamtyktini fyri Gjógv

Broytingin umfatar matr. litra a landsvegur við Gjógv.

Partur av litra a, sum liggur fram við matr. nr. 198 og 139a og eitt stykkið av litra a, sum liggur norðanfyri landsvegin við marki móti matr. nr. 36 við Gjógv, verður broytt frá H-øki (frílendi ) til B øki (bústaðarøki).

Broytingin liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni í vanligari skrivstovutíð

Frá 16.12.10 til 6. jan. 2011 báðir dagar íroknaðir

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot, sum skulu vera skrivlig, skulu vera Sunda kommunu í hendi í seinasta lagi 16.03.2011.

*Oyrarbakki tann 14.12.10*

**Sunda kommuna**
**Oyrarbakkavegur 3**
**Postboks 10**
**400 Oyrarbakki**

ADVOKATSKRIVSTOVAN

## TVINGSILSSØLA

Týsdagin tann 21. desember 2010 kl. 09.15, verður fyrireikandi tvingsilsølufundur og týsdagin tann 11. januar 2011 kl. 09.30, verður endaligur tvingsilsølufundur av matr. Nr. 384a, Klaksvíksvegur 54, Klaksvík. Tvingsilsølan verður hildin á Dómaraskrivstovuni í rættarsali IV, undir Glasheyggi 14, 100 Tórshavn.

Talan er um spinnarí og handilshøli. Bygningurin er í einari hædd við lofti, er gjørdur úr betong og taktur við jarni. Bygningurin er innrættaður soleiðis:

**Niðara hæddin:**
Handilshøli, gangur, spinnarí við kærumaskinum og spinnimaskinu. Ovara hæddin er býtt í trý rúm og wc. Har standa tvinnari, hespari og gomul bindimaskina.

Bygningurin er ikki bjálvaður og krevur ábøtur. Bygningurin er samanbygdur við grannaognirna.

Grundøkið er 351 m² og liggur við høvðusveg.

Nærri upplýsingar um ognina fáast við at venda sær til Fríðu Patursson, advokatur, Frúutrøð 4, Tórshavn, tel. 353335 frp@jura.fo (j.nr. 20100798) ella skrivaran anniku Reginsdóttir Olsen aro@jura.fo

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6
FO-110 TÓRSHAVN
TEL 35 33 35 · FAX: 35 33 36
WWW.JURA.FO

## Størv í Fótbóltssamband Føroya

**Fótbóltssamband Føroya søkir eftir tveimum starvsfólkum fulla tíð og einum starvsfólki (vaski/køksfólk) hálva tíð at byrja skjótast tilber:**

### Starvsfólk til umsitingaruppgávur

Talan er um m.a. hesar uppgávur:

**Loyvisstjóri**
- Umsitir UEFA loyvisskipanina
- Skrivari í loyvisnevndini og kærunevndini í loyvismálum

**Samskifti við kommunur o.o. um vallir v.m**
- Leikvallirnir kring landið
- Sparkivallirnir

**Leikarasáttmálar**
- Avgreiðing av øllum leikarasáttmálum

**Grassrootsleiðari**
- Samskipan av grasrótararbeiði innan FSF, bæði í heimligum og altjóða høpi

### Samskipari/ kunningarleiðari

Talan er um m.a hesar uppgávur:

**Samskipan av føroysku luttøkuni í altjóða fótbólti**
- Samskipan av øllum føroyskum landsliðsfótbólti
- Samskipan av altjóða luttøkuni hjá føroysku fótbóltsfeløgunum

**Kunningarleiðari**
- Ábyrgd av heimasíðu FSF´s
- Ábyrgd av útgávum FSF´s

**Menning av FSF skipanini**
- Ábyrgd av at menna FSF skipanina, soleiðis at øll skráseting v.m fer fram á netinum

**Til bæði størvini ynskir FSF at tú hevur:**
- fyrisitingarligar førleikar
- innlit í bæði føroyskan og altjóða fótbólt
- góðan kunnleika til KT
- gott yvirlit, dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- hegni at arbeiða konstruktivt saman við øðrum
- tað hevur týdning at tú dugir føroyskt, norðurlendskt og enskt mál í skrift og talu

Vit bjóða sera spennandi, krevjandi og sjálvstøðug størv. Størvini kunnu innibera eitt sindur av ferðing uttanlands, og má umsøkjarin tola skiftandi arbeiðstíðir.

Starvið gevur góðan møguleika fyri fakligari og persónligari menning.

Løn og setanartreytir verða sambært avtalu.

### Vaski/køksfólk 20 tímar um vikuna:

**Starvsøki:**
- Umsiting/reingerð í FSF-húsinum
- Reingerð av klæðum
- Matgerð og innkeyp av mati í sambandi við skeiðs- og fundarvirksemi í FSF húsinum

Løn og setanartreytir verða sambært avtalu.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Virgar Hvidbro, aðalskrivara, á tel 220535.

*Umsóknir skulu sendast til:*
*Fótbóltssamband Føroya*
*Postboks 3028*
*110 Tórshavn*

Umsóknarfreist 4. januar 2011.

1979

www.fsf.fo

# REINGERÐARFÓLK

## Søkt verður eftir reingerðarfólki til Pakkhús 4 (ungdómshúsið) 4 tímar um vikuna

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran á tlf. nr. 28 18 85.
Umsóknir skulu sendast til:

**Tvøroyrar kommuna**
Postboks 80
800 Tvøroyri

*Merkið brævbjálvan "Pakkhús 4"*

Umsóknarfreistin er **23. desember 2010**

TVØROYRAR KOMMUNA

**Fjeppari?**
**Les um ítrótt í Sosialinum**



